## UTTAN ÚR HEIMI

### Reagan á seðlar og myntir

Fleiri leiðandi limir í republikanska flokkinum í USA halda, at fyrrverandi forsetin Ronald Reagan eigur at fáa pláss á dollarseðlum og myntum.

Senatorurin Mitch McConnell heldur, at 10-dollaraseðilin skal hava eina mynd av Reagan, og Dana Rohrabacher, sum situr í Umboðsmannatinginum, vil hava Reagan avmyndaðan á 20-dollaraseðlinum. Fær gamli forsetin pláss á øðrum av seðlunum, er tað fyrstu ferð síðani 1929, at USA broytir myndirnar á pengaseðlunum.

Skal Reagan upp á dollaraseðlarnar, skulu bæði Senatið og Umboðsmannatingið samtykkja tað. Tí halda summir politikarar, at hann heldur skal upp á 10-centmyntin, tí ta avgerðina kann fíggjarmálaráðið taka uttan at spyrja politikararnar. Viðhaldsfólk hjá Reagan hava skotið upp at seta hann á 10-centmyntin, men trupulleikin er, at á aðrari síðuni á tí myntinum er ein mynd av sjálvum Franklin D. Roosevelt, forseta. Ein neyðloysn kann vera at seta Reagan á hina síðuna, skrivar Washington Post.

### Funnu rúsevni fyri milliardir

Løgreglan á Fiji-oyggjunum gjørdi eitt ræ

ttiligt kvetti, tá hon rannsakaði eina verksmiðju seinasta sunnudag.

Í bygninginum funnu løgreglumenninir eina rannsóknarstovu, sum fekst við at gera ymisk rúsevni. Í goymsluni á verksmiðjuni komu løgreglumenninir fram á eina rúgvu av rúsevnum, og hildið verður, at vóru evnini komin á marknaðin, høvdu sølumenninir fingið meiri enn tríggjar milliardir krónur burturúr. Sambært løgregluni vóru evnini ætlað rúsevnamarknaðinum í USA, Evropa og Avstralia.

Talsmaðurin hjá myndugleikunum á Fiji-oyggjunum, Andrew Hughes, sigur, at á rannsóknarstovuni vóru ráevni til at gera eitt tons av ymsum rúsevnum. Hildið verður, at rannsóknarstovan var før fyri at gera eitt hálvt tons av rúsevnum um vikuna.

### Kvinnur kunnu reka vinnu

Í Saudiarabia hava myndugleikarnir samtykt at broyta eina vinnulóg, so nú er tað loyvt kvinnum at hava egna fyritøku. Sambært arabiska sjónvarpinum Al-Jazeera hevur lógarbroytingin tvinni endamál. Annað er at útvega fleiri arbeiðspláss, og hitt er at forða fyri yvirgangi.

Fyrr kundu saudiarabiskar kvinnur ikki hava eina fyritøku, uttan at ein skyldmaður ella onkur annar stóð sum eigari. Harafturat hava átrúnaðarligar og sosialar avmarkingar forðað kvinnum í at gera seg galdandi í fleiri vinnugreinum. Samstundis er tað ein sannroynd, at í Saudiarabia eru tað yvirhøvur kvinnurnar, sum fáa sær hægri útbúgving, men at tær flestu kortini fáa lítið og einki burtur úr útbúgvingini.

Nógv fólk í Saudiarabia eru arbeiðsleys. Myndugleikarnir siga, at arbeiðsloysið er niðan fyri 10 prosent, men útlendskir eygleiðarar halda, at í veruleikanum liggur tað um 20 prosent.

### Enron skal endurskipast

Í USA eru ætlanir um at endurskipa ta risastóru fyritøkuna Enron, sum fór á húsagang fyri trimum árum síðani eftir eina fíggjargølu. Eitt nú vísti tað seg, at fíggjarstøðan hjá felagnum var nógv verri, enn leiðslan og grannskoðararnir høvdu sagt, og harafturat høvdu stjórarnir fingið sær betri løn, enn tey flestu kunnu droyma um.

Tá húsagangurin bleiv gjørdur upp, vísti tað seg, at Enron skyldaði næstan 400 milliardir krónur. Nú verður skotið upp, at tey, sum eiga pengar hjá felagnum, skulu fáa umleið ein sættapart av tí, sum tey eiga. Av hesum skulu tey fáa 70 prosent í pengum, meðan tey írestandi 30 prosent verða latin sum partabrøv í tí nýggja Enron.

Amerikonsku myndugleikarnir hava ákært fleiri av teimum gomlu leiðarunum í Enron fyri svik og fíggjarundandrátt, og tað fyrsta sakarmálið byrjaði mánadagin. Men uppgerðin við tað gamla er dýr. Hildið verður, at sakførara- og grannskoðararokningarnar eru komnar upp í 4,5 milliardir krónur higartil.

# Rumsfeld hevði góðkent ta hørðu framferðina

**Í fleiri førum góðkendi amerikanski verjumálaráðharrin, at amerikanskir hermenn kundu fara út um tað, sum Geneve-sáttmálin loyvir**

AVHOYRINGAR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanski herurin hevur eina hondbók, sum ásetir, hvussu hermenninir skulu og kunnu bera seg at, tá teir avhoyra fangar hjá mótpartinum. Hondbókin skal tryggja, at hermenninir halda seg til tað, sum er ásett í Geneve-sáttmálanum um slík viðurskifti.

Men teir amerikonsku hermenninir, sum eru í Afghanistan og Irak, hava eina øðrvísi hondbók. Í henni eru 24 reglur um, hvussu teir avhoyra limir í Taliban ella menn, sum verða hildnir at hava samband við felagsskapin al-Qaeda. Sjey av hesum reglunum standa ikki í teirri vanligu hondbókini hjá amerikanska herinum, men tær vórðu settar í hondbókina hjá hermonnunum í Afghanistan og Irak eftir góðkenning frá Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra, skrivar Reuters.

Ein talsmaður hjá Pentagon váttaði týsdagin, at hermenninir í Afghanistan og Irak hava eina øðrvísi hondbók, og at sjey frávik eru. Fýra teirra kunnu hermenninir nýta uttan at biðja um loyvi til tess, men í hinum trimum førunum krevst góðkenning frá verjumálaráðharranum.

Talsmaðurin, Bryan Whitman, vildi ikki siga, hvat stendur í teimum sjey reglunum, sum eru komnar afturat. Hann segði kortini, at verjumálaráðið umhugsar at kunna almenningin um reglurnar fyri at sleppa undan gitingum um, at USA brýtur ásetingarnar í Geneve-sáttmálanum.

Fyrradagin sýtti løgmálaráðharrin, John Ashcroft, fyri at almannakunngera eitt skjal, sum eftir øllum at døma sigur, at USA tilskilar sær rætt at nýta harðskap og píning í bardaganum ímóti yvirgangi.



*Sambært Reuters góðkendi Donald Rumsfeld, at hermenninir í Afghanistan og Irak fara út um reglurnar í Geneve-sáttmálanum, tá teir avhoyra fangar har*

*Mynd: Reuters*

# Sleppur undan fongsulsrevsing

**Mijailo Mijailovic, sum myrdir Onnu Lindh, er sálarsjúkur. Tað ger, at hann væntandi sleppur leysur um nøkur fá ár**

LINDH-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Drápsmaðurin hjá Onnu Lindh, Mijailo Mijailovic, er sálarsjúkur*

Tann 23. mars varð tann 25 ára gamli Mijailo Mijailovic dømdur sekur í at hava myrt svenska uttanríkisráðharran Onnu Lindh tann 10. september í fjør.

Undir rættarviðgerðini bleiv Mijailovic sálarkannaður, og Eva-Maria Laurén, yvirlækni, kom til ta niðurstøðu, at maðurin var ikki sálarliga sjúkur. Tí avgjørdi rætturin at døma hann lívlanga fongsulsrevsing.

Verjin kærdi dómin. Síðani hevur professarin Anders Forman kannað Mijailo Mijailovic, og hann er nú komin til ta niðurstøðu, at drápsmaðurin er sálarliga sjúkur. Góðtekur rætturin hesa niðurstøðuna, verður Mijailovic ikki dømdur lívlanga fongsulsrevsing. Ístaðin fyri skal hann á eitt viðgerðarheim fyri sinnissjúk, og sambært Aftonbladet kann hann rokna við at sleppa leysur um nøkur fá ár.

Sambært blaðnum hevur eitt serligt rættarráð hjá teimum sosialu myndugleikunum kannað niðurstøðuna hjá Anders Forsman, og ráðið sigst taka undir við professaranum í, at Mijailo Mijailovic er sálarsjúkur.

# Mount Everest skal ruddast

**Tað er vorðið so óruddiligt uppi á heimsins hægsta fjalli, at nú má ruddast**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í september fara umleið hundrað sjálvboðin niðan eftir Mount Everest at rudda. Tey fara ikki niðan á sjálvan tindin, men ætlanin er í hvussu er at sleppa einar 6.500 metrar niðan eftir fjallinum.

Ein talsmaður fyri ruddingarfólkini sigur við BBC, at umleið 615 tons av óruddi liggur og sløðist í erva í fjallalíðunum, og at tað má fáast burtur haðani, áðrenn tað órógvar umhvørvið.

Kinesiska blaðið China Daily skrivar, at umleið 20.000 fólk vitja leiðina við Mount Everest á hvørjum ári. Áhugin fyri at sleppa niðan eftir sjálvum fjallinum er eisini vaksin nógv tey seinnu árini, men tað eru bara tey fægstu, sum megna at sleppa upp á sjálvan tindin.




# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**KIA CARNIVAL 7- PERSÓNA DIESEL**
Árg okt.2003, Km 27.000. Um hóskandi boð fæst verður hesin 7-persónabilur seldur vegna keyp av minni bili.
**Tel. 260825**



**ROVER 200 SI**
Árg mars. 2000, Km 42.000. Til sølu vegna flyting
**Tel. 328003 - 270609 - +45 28922575**






**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apr-98, Km 28.000. Sera vælhildin Top modell: Bert koyrt 28.000 km. Klimaanlegg, Leðurinntrekk, Sóltak, El-rútar, El-spegl, Fjarstýrt Centrallás, Radio, Alufelgur, Spoylarar v.m. Sertilboð kr. 198.000



**KIA CARNIVAL 2.9 HPDI EX MODEL**
Árg Mar-02, Km 195.000. Top modellið: Aircondition, Automatgear, Regnsensor, El. stýrt førarasetur, El-rútar fr.+ aftan, El. spegl, Fjarstýrt centrallás, Hita í forrúti, C.D.anlegg-Mjørkal. Leður róður v.m.
Kr. 220.000



**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg Apr. 1999, Km 71.000. El-rútar fr.- Valnød Instrumentbretti, Takboylar, Sleipikrók v.m. Kr. 86.000



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg Okt. 1997, Km 159.000. El-rútar. fr.- Valnød Instrumentbretti- Takboylar- Sleipikrók v.m. Kr. 58.000



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Aircondition, Alufelgur, Fjarstýrt centrallás, El-rútar, El-spegl v.hita. C.D.Anlegg, Sleipikrók v.m. Kr. 158.000



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR 4 HJÓLSTREKK**
Árg Mar-98, Km 63.000. Bakkisensor, 4 WD v.Reduktiónsgear, Fjarstýrt centrallás, El-rútar, El-spegl- C.D. Anlegg v.m. Kr. 118.000



**NISSAN ALMERA 1.6 GX**
Árg Maj 1998, Km 61.900. Vælhildin: Alufelgur, Fjarstýrt centrallás, El-rútar, El-spegl v.m. Kr. 108.000



**DAIHATSU CHARADE 1.0 5 HUR_AR**
Árg Jun-93, Km 79.000. Vælhildin: Nýsýnaður, Radio v.m. Kr. 35.000



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Centrallás, El-rútar, El-spegl, Radio v/bandspælara v.m. eyka tectylviðgjørdur. Kr. 78.000

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**


# Havnalagsútbygging í Kollafirði og náttúrufyrilit



Koyrir tú norðureftir, og kemur úr bergholinum millum Kaldbaksbotn og Signabø, sært tú hesa myndina. Vøkur náttúra og havnaútbygging. Góð havnarviðurskifti er ein grundleggjandi fyritreyt fyri einum virknum vinnulívi, og tey flestu frøast um vælferð og framgongd.

Vit eru tó nøkur, sum harmast um at útbyggingarnar eru so nær sandinum, og at útbyggingarnar eru ov ógvusligar. Útbyggingarnar eru um hálvtannað hundarað metrar frá áarósanum og áttu í hvussu er at hildið tvífalda fjarstøðu. Fjarstøðan millum uppfyllingarnar norðarumegin og sunnaru megin er alt ov lítil, bert ein smalur geiri er eftir. Útbyggingin sunnaru megin átti helst ikki at verið gjørd og norðara uppfyllingin skuldi verið sneidd meira hegnisliga í mun til lendið. Útbyggingin er estetiskt skeiv, hon hóskar ikki á staðnum, og skemmir sermerkta landslagið innanfyri.

Smali sjóargeilin, sum stendur eftir, er helst ov lítil til at sandurin framhaldandi kemur at síggja út sum hann ger í dag. Sjógvútskiftið er helst ov lítið og upphóping av tilfari úr ánni vil sannlíkt broyta landslagið við tíðini.

Tað kann undra, hvussu hesar útbyggingar eru komnar í lag, og hví eingin hevur funnist at. Enn ber til at bøta um skaðan, men so skal berast skjótt at.




# Hjólið á Shellstøðunum

**Hjólið, blaðið hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør er nú at fáa á Shellstøðunum kring landið. Í blaðnum eru nógvar myndir og áhugaverdar greinar**

*Tíðindaskriv*

Hjólið er nú aftur at fáa á Shellstøðunum kring landið.

Í blaðnum eru, umframt tíðindi frá felagnum, fleiri áhugaverdar greinar og hópin av myndum, sum t.d. flaggdagskoyringin, vitjan hjá donskum Mercedes-serfrøðingi, Krøniku-bilarnir frá kendu donsku sjónvarpsrøðini, vitjanin hjá Biker-Jens í Føroyum, gamlar myndir og triði partur av bilasøguni í Vágum, sum krimi-rithøvundurin, Einar Petersen, sáli, hevur skrivað.

Hjólið er at fáa á øllum Shell-støðunum og kostar 20 krónur.